# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



28. feb. fingu Marjun og Sigmundur Olsen, Porkeri, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3700 gr.

2. feb. fingu Unn og Petur Martin Glerfoss, Keypmannahavn, eina dóttur, ið eitur Mirjam. Hon var 52 cm. og vigaði 3848 gr.

10. feb. fingu Mary Ziska og Heri Henriksen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 3000 gr.

13. feb. fingu Anna og Atli Rasmussen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 4080 gr.

16. feb. fingu Merry Tindskarð og Hans Pauli Justinussen í Hvidovre, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3612 gr.

22. feb. fingu Annika og Kári Brynjar, Hvannasund, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3620 gr.

24. feb. fingu Björn og Hennibeth Kalsø, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3500 gr.

28. feb. fingu Elin Sólsker og Andras Hansen, Æðuvík, eina dóttur. Hon var 57 cm. og vigaði 3850 gr.

28. feb. fingu Jónley Lauritsen og Hans Poulsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3550 gr.

1. mars fingu Randi og Pauli Petersen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3550 gr.

1. mars fingu Sigga og Ragnar S. Olsen, Søldarfjørður, ein son, ið eitur Olaf S. Olsen. Hann var 51 cm. og vigaði 3700 gr.

1. mars fingu Sunnuvá Bjarnastein og Páll Olaf Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm. og vigaði 4120 gr.

3. mars fingu Katrin á Fløtt Jacobsen og Hans Wilhelm Anthoniussen, Årestrup, Danmark, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 3570 gr.

3. mars fingu Kitinesh Birhanu og Yacob Lemita, Norðragøta, ein son. Hann var 49 cm. og vigaði 2820 gr.

3. mars fingu Rosalie Thomsen og Heine Thomsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3090 gr.

5. mars fingu Olly Óladóttir Poulsen og Jákup Poulsen, Leirvík, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3600 gr.

5. mars fingu Annita á Fríðriksmørk og Páll Olsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4100 gr.

## Andlát

27. februar
Ingibjørg Bjerregårð, Keypmannahavn, ættað av Tvøroyri, 80 ár

28. februar
Henning Jensen í Kalundborg, fyrr búsitandi í Gerðinum í Klaksvík, 75 ár.
Åge Nørregaard Olsen, Trongisvágur, 72 ár.
Hans Petur Hansen, Hósvík, 92 ár.
Semary Joensen, Noráagøta, 87 ár.

2. mars
Poulina Thomsen, Skopun, 44 ár.
Jóhanna Debes, Tvøroyri, 72 ár

3. mars
Palle Jespersen, Tvøroyri, bús. Í Jyderup, 86 ár

4. mars
Óli Jóhann Láberg, í Skopun, 90 ár.
Torgerð Simonsen, Sørvágur, 73 ár.

## Nicolai Nysted farin



23. februar andaðist Nicolai Nysted í Hvannasundi. Hann var 78 ára gamal. Ivaleyst eru tey mong, sum komast við Nicolai, sum í mong ár var partur av manningini umborð á Másanum, sum røkir farleiðina úr Hvannasundi og til Svínoyar og Fugloyar.

Nicolai var av Kyrjarheyggi í Hvannasundi. Hetta vóru fyrstu húsini, sum vórðu bygd uttanfyri garðarnar. Tey vóru bygd í 1913. Foreldrini vóru Oliva og Hans Justesen. Tey fingu átta børn: Jógvan Ísak, Edith, Jóhannes, Nicolai, Niels, Arne, Anna og Sjúrður.

Trý av systkjunum vóru rættuliga ung, tá ið tey fóru. Jógvan Ísak ella Eddaba, sum hann varð nevndur, var 27 ára gamal, tá ið hann doyði av menegitis, Edith var 21 ára gomul, tá ið hon doyði av tuberklum, og Arni var 17 ára gamal, tá ið hann druknaði í Sundinum í 1945. Teir vóru fýra í bátinum, sum holvdist. Bara ein kom frá tí við lívinum.

Niels, sum doyði miðskeiðis í níti árunum, búði í Víkunum í Klaksvík. Hann var giftur við Idu, sum var úr Heimistovu á Vágsheygnum. Hon doyði nakrar fáar dagar frammanundan, at Nicolai doyði. Anna býr í Hvannasundi, og Sjúrður býr í Kaldbak, har hann hevur verið lærari. Hannis býr í Rødovre. Hann fylti 80 stutt frammanundan, at Nicolai doyði. Nicolai og dótturin høvdu verið niðri í føðingardegi, og tað var stutt eftir heimkomuna, at Nicolai gjørdist sjúkur og doyði eftir stutta sjúkralegu.

Nicolai var føddur 5. juli í 1924. Í 1953 giftist hann við Jóhonnu Justesen, sum er ættað úr Norðdepli. Tey búsettust í Hvannasundi og fingu seks børn. Fýra búgva í Hvannasundi – Irena, Hans Jørgin, Livar og Jonika. Sigmar og Jógvan Josias búgva í Klaksvík.

Nicolai var sjómaður alla sína tíð. Hann róði út og driftaði útróðrarbát, og hann var við fleiri línuskipum, eitt nú Kalsevni, Jógvani S og Norðingi. Fyrst í sjeyti árunum fór hann umborð á Másan, og har var hann, inntil hann fyri tíggju árum síðani varð pensioneraður. Hugurin til sjógvin og fiskiskap var alla tíðina góður. Tá umstøður vóru til tað, var Nicolai á floti, ella fekst hann við fiskireiðsskap og egning. Eisini seinnu árini, sjálvt um sjónin bilaði, og hann tey seinastu árini onga sjón hevði.

# Livar Nysted í Smiðjuni



*Livar Nysted úr Hvannasundi hevur málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík frá fríggjadag til og við hósdag*

*Mynd: Jens K. Vang*

### Fríggjadagin klokkan eitt lat Livar Nysted úr Hvannasundi upp málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

MÁLNINGA-FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*

Livar Nysted sýnir fram 22 málningar á framsýningini. Talan er um akrylmálningar av øllum møguligum alt frá landslogum til fólk.

– Hetta er ikki abstrakt list, so ein sær, hvat tað er, sigur Livar, sum dámar sera væl at mála fólk.

Hann er sera spentur at vita, hvussu tað fer at gangast í Havn, tí hetta er fyrstu ferð, at hann hevur framsýning í Havn.

– Eg vóni, at Havnarfólk fara at taka væl ímóti mær, sigur Livar, sum hevði kunnað hugsað sær at liva av listini. Men hann veit, at tað er sera torført.

– Tey flestu, sum mála hava annað fast arbeiði við síðuna av, eisini teir stóru málararnir, um ein kann siga tað so, sigur Livar.

Livar býr í Hvannasundi og hevur altíð teknað nógv. Hann sigur, at hann fær nógvan íblástur av at búgva á einum smáplássi og tætt við sjógvin.

– Vit búgva einans tríggjar-fýra metrar frá sjónum, og har fær ein altíð nógvan íblástur og sær mangt ymiskt. Millum málningarnar, sum eg havi málað hesuferð eru tríggir veðrar, og tað er lítið at ivast í, hvar tann íblásturin er komin frá, sigur Livar, sum til dagligt starvast á Føroya Bjór.

Hann byrjaði ikki at mála av álvara fyrr enn fyri átta árum síðani. Hann hevði sína fyrstu framsýning á Húsarhaldsskúla Føroya einaferð í 1990. Tá var tað bara blýantstekningar. Kona hansara, Svanna, eggjaði honum til tá. Síðani tað hevur hann havt fleiri framsýningar ymsastaðni í Klaksvík, og tekningin hevur ment seg til oljukrit og so seinni til at mála. Og nú hevur hann eisini gjørt av at royna seg uttan fyri Klaksvík.

Framsýningin í Smiðjuni er opin frá fríggjadag til og við hósdag frá klokkan 13 til 18, tó verður stongt sunnudagin.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Ingolf Rasmussen 65 ár



6. mars fylti Ingolf Rasmussen skipari í Havn 65 ár. Ingolf er føddur og uppvaksin í Søldarfirði. Hann fór til skips við slupp sum 16 ára gamal og sigldi við ymiskum fiskiskipum, áðrenn hann fór á stýrimansskúla í 1959. Tá hann hevði fingið stýrimansprógv í 1961, sigldi hann í eitt ár. Í 1962 tók hann skipsføraraprógv á Fanø Navigationsskole. Eftir tað sigldi hann við skipum hjá danska reiðarínum ØK í nøkur ár. Í 1971 fór hann at føra trolara hjá KGH í Grønlandi til 1978, tá hann fór at føra Sólborg hjá Eiler Jacobsen. Tá Sólborg bleiv seld til Royal Greenland í 1986, helt hann áfram sum skipari til 1990 og síðan við øðrum skipum hjá sama reiðarii til 1992. Hann hevði farloyvi frá Royal Greenland í 1993, tá hann førdi nýggju Sólborg. Síðan var hann skipari hjá Royal Greenland til 2002. Í dag førir hann trolaran Ljósafellið hjá Mortan Johannesen. Ingolf hevur eisini yrkt og umsett fleiri sangir. Fleiri nýggjar sangir hjá sangkórinum í Ebenezer hevur hann umsett. Ingolf er giftur við Jónu, f. Guttesen, í Havn og eiga tey børnini Jens Paula og Sigrið. Sum sjómaður hevur hann upplivað allar broytingarnar frá sluppunum til teir størstu nútímans trolararnar.

## Albert Hentze skóti í 35 ár



Á grækarismessu, 12. mars, hevur Albert Hentze í Vági verið skóti í 35 ár. Albert er føddur og uppvaksin í Vági, hann er 48 ára gamal og útbúgvin jarnsmiður Hann arbeiðir í dag hjá partafelagnum Tvøruni í Vági. Líka síðan Skótaliðið Royndin bleiv endurstovnað í 1968, hevur hann verið ein av skótunum og er hann bólkaleiðari í Vági.

Skótaliðið í Vági bleiv upprunaliga stovnað í 1940. Stigtakarar vóru Torkil Beder, Erling Poulsen, Svend Thulesen saman við E. Thulesen, sum tá var prestur í Vági. Teir sum endurstovnaðu skótaliðið í 1968 vóru Kjartan Mørkøre, Jákup Olsen, Jóannes Fonsdal og aðrir. Albert Hentze er giftur við Arnfríð, f.Vestergaard, úr Vági, og eiga tey 3 børn, 2 gentur og ein drong. Øll í familjuni eru virkin í skótaarbeiðinum í Vági.

## Hjørmund Vang 75 ár



Í dag, leygardagin 8. mars, verður Hjørmund Vang í Hvalba 75 ár. Hjørmund er føddur og uppvaksin í Hvalba, og arbeiddi hann í mong ár í kolanámunum har. Hann hevur eisini verið arbeiðsmaður og fiskimaður í Grønlandi í mong ár. Í 1953 varð hann fyri eini spreingivanlukku í kolamáminum. Vanlukkan kostaði honum hálvan annan fingur á vinstru hond, og skaddi honum sjónina á øðrum eyga fyri lívið. Seinni kom hann aftur út fyri einum óhappi, tá hann av misgávum kom at skjóta seg sjálvan í vinstra lær. Hann hevur verið úti fyri eitt sindur av hvørjum, tvær ferðir hevur hann verið nær við at dottið oman. Hjørmund er ein partur av býarmyndini í Hvalba og Sandvík Hann hevur eina trøð í Sandvík, har hann hevur sína dagligu gongd. Vanliga hevur hann gingið millum bygdirnar, men nú havur hann fingið sær ein skutara. Hjørmund er ein sera lívsglaður persónur, sum elskar tónleik, serliga gamlar slagarar og honum dámar væl at ganga í dans.

## Jóan Heri Joensen heldur grækarismessurøðu



Í Fuglafirði verður skipað fyri grækarismessuhaldið grækarismessudag, mikudagin, klokkan 17.

Haldið verður Heimi á Bug við Bókasavni. Skótarnir fara at ganga skrúðgongu frá skótahúsunum oman á Bug, har Fuglafjarðar Hornorkestur spælir, og har Jóan Heri Joensen, lærari, fer at flyta fram røðu.

## Lena á Ørg 75 ár



Mikudagin 5. mars fylti Lena á Ørg í Sørvági 75 ár. Foreldur Lenu vóru Bina Yviri í Húsi og Jógvan Joensen, róptur Mýru-Jógvan.

Lena var gift Jóhan á Ørg, sum doyði fyri 8 árum síðani, á sjálvum føðingardegnum hjá Lenu.

Lena og Jóhan fingu børnini, Jógvan og Annebeth. Fostursonin, Sonna Jacobsen, sum er bróðursonur Jóhan, tóku tey til sín trý ára gamlan.

Í mong ár høvdu Lena og Jóhan handil í Pollastovu, har tey seldu leikur, bøkur, bløð og pappírsvørur.

Lena er arbeiðssom, bindur og bakar og rokast altíð við økkurt.

Føðingardagurin var hildin heima hjá Lenu mikukvøldið, har fitt av fólki var samankomið at heilsa upp á føðingardagsbarnið.

# Minningarorð um Trónd Udbø Petersen

**7. september 1983 10. februar 2003**



Tað, at vit á okkara arbeiðsplássi sita og skriva minningarorð um ein arbeiðsfelaga, er ógvuliga tungt. At lívsbráðurin hjá einum menniskja í sínum besta aldri, í sínum fagrasta blóma, bara verður avkvettur, er sera ringt at skilja.

Góði Tróndur, at tú skuldi doyggja á so ungum árum, gevur okkum ein sannan hvøkk. Hvussu kann tað lata seg gera? Hvussu ber tað til? Kann tað veruliga passa? Vit kunnu bert ásanna, at svarið er ja.

Góði Tróndur, tú vart ein sera fittur og hjálpsamur drongur, altíð klárur, um ein heitti á teg. Framúr kreativur vart tú í tínum arbeiði, og nú tú vart útlærdur, hevði tú nógvar ætlanir. Tað hevði verið stuttligt at sæð, hvat eitt so evnaríkt menniskja hevði fingið burtur úr lívinum.

Dagar tínir vóru taldir, og tú skuldi her frá. Sum ein smágenta segði, so fórt tú upp til Jesus pápa at hjálpa at gera hárið hjá einglunum, líka sum tú gjørdi hjá einglinum í jólabýnum til jóla. Ja, hvør veit?

Góðu Albert, Ninna, Annika, Guðrun og øll avvarðandi. Má Harrin styrkja tykkum í tykkara stóru sorg, og hjálpa tykkum at koma víðari í lívinum.

Góði Tróndur, takk fyri tíðina vit fingu saman við tær.

Hvíl í friði.

**Starvsfelagarnir í Fríðkuni, Flykruni og Liljuni**

## 80 ár

Týsdagin 11. mars verður Thala Rókstein, Fuglafjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá Kaj Eli Blábjørg, Mørkin 22.

## 75 ár

Mánadagin 10. mars fyllir Jona Jonsen, Miðvágur, 75 ár. Dagurin verður hildin heima.

## Silvurbrúdleyp

Týsdagin 11. mars hava hjúnini Ann og Johan Hansen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni í Tinghøjvej 25, 7330 Brande.

Hósdagin tann 27. mars hava Jóhanna og Eifinn á Reynatrøð, Leirvík, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 29. mars kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 443187 innan 20. mars.

27. mars hava Sunnuvá B. og Heri Jacobsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Norð á Viðareiði leygardagin 29. mars kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 456562 ella 216562 áðrenn 15. mars.

## Sosialurin um vikuskiftið

Hetta vikuskiftið hittist Sosialurin á telefon 211803 ella á ingras@kallnet.fo